# Kemilux fer eftir heimamarknaðinum

*Kemilux er ein av teimum eldru fyritøkunum á vørumessuni, og hesuferð leggur hon seg serliga eftir heimliga marknaðinum*



*Umleið helvtin av søluni hjá Kemilux fer úttanlands, men á messuni leggja teir seg serliga eftir heimamarknaðinum*

STEFAN Í SKORINI

Kemilux Industri fer umframt hondsápu at vísa fram nakað annað av tí, tey framleiða til alt slag av reingerð á stovnum, skúlum og barnagørðum. Hetta er til alla dagliga reingerð í einum bygningi, har nógv fólk savnast.

Tað er tó ikki nóg mikið bara at selja reingerðingsevni, men eisini útgerð at vaska við, og tað ger Kemilux eisini. Tað er eisini umráðandi, at henda útgerð er ergonomisk røtt. Tað vil siga, at reingerðingsfólkið ikki fær mein av at vaska í skeivari kropsstøðu. Slík útgerð verður eisini at síggja á vørumessuni. Tey hava í hesum sambandi eisini havt skeið fyri reingerðarfólk.

Tey leggja seg eftir at viðskiftafólk kann fáa alt á einum stað, tá talan er um reingerðing.

Kemilux útflytir umleið helvtina av framleiðsluni, men á messuni verður serliga hugsað um marknaðin í Føroyum.




*Á básinum hjá Esmari Simonsen fara tey serliga at leggja seg eftir at sýna fram legur av ymsum slag, eins og barnastólar eisini verða sýndir fram*

# Esmar við billutum

*Esmar Simonsen á Kambsdali fer á vørumessuni mest at sýna fram billutir og barnastólar*

STEFAN Í SKORINI

Esmar Simonsen er umboð hjá SKF, Svenska Kugellag Fabrikkerna, í Føroyum, og fleiri av vørunum frá hesi verksmiðju verða at síggja á vørumessuni.

Serliga verður høvi at síggja kúlulegur, rullulegur og aðrar transmissiónslutir. Í hesum sambandi verða tey nýggjastu amboðini innan avmontering sýnd fram. Nú ber til at sleppa undan at brúka sleggju og meitil, sum vanligt hevur verið.

Eisini verða barnastólar sýndir fram. Her hevur Esmar Simonsen fingið ein sera væl umtóktan stól til nýføðingar heim.

Annars er fyritøkan kanska mest kend fyri at selja bilar, men á hesi messuni verður dentur fyrst og fremst lagdur á billutir. Ymiskar legur og slitlutir annars.

Fyritøkan umboðar Deawoo bilar, sum fyri stuttum komu til landið, og á Kambsdali arbeiða eini tjúgu fólk.


## Alt á einum stað

EL- *Alt elarbeiði*

EDV- *Teldukervsloysnir - tráleysa ella við kaðal.*
*Eisini fiburkaðalum - klárt til at seta telduna til.*

TELE- *Allur telefonvekslaraútbúnaður uttan mun til støðd.*
*Innanhýsis telefonkervi.*
*Avgreiðsla av øllum umsóknarbløðum.*

el&tele leggur dent á, at varveita loysnir á høgum tekniskum støði og við treyta-leysari góðsku, innan el-edv-telekerv.
Okkara mál er at hava førleika til at designa, installera og røkja ta samskiftis-tøknina, sum er og vil koma.
Vit bjóða okkum eisini til at ráðgeva tykkum í øllum spurningum innan el-edv-tele-kerv.

*Royn okkum!!! Vit eru smáir, men skjótir og álítandi.....*

**el&tele**
Telefon 354 354 • Fax 354 355







